**Eyðgunn Samuelsen**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a**

**Fyrispurningur um ferðaætlanina á leið 400, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni við fíggjarmálum (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)**

1. Heldur landsstýrismaðurin tað vera nøktandi tænasta til norðoyingar og eysturoyingar bert at hava møguleika at ferðast beinleiðis við SSL gjøgnum Eysturoyartunnilin tvær ferðir um samdøgrið, kl. 6.25 á morgni og kl. 16.15 seinnapart?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at hetta tilboðið frá SSL fer at fáa norðoyingar og eysturoyingar at brúka tunnilin meira?
3. Fer landsstýrismaðurin at gera nakað fyri at fáa eitt betri samband gjøgnum tunnilin?

**Viðmerkingar**
Fyri mong var tað eitt vónbrot at síggja endurskoðaðu ferðaætlanina hjá SSL, nú farleiðin millum Klaksvík og Tórshavn er eftirmett. Ferðaætlanin er skipað soleiðis, at Leið 400 aftur koyrir gomlu farleiðina til Havnar gjøgnum Sundalagið og ein snarbussur, Leið 401, er settur í koyring tvær ferðir um dagin – kl. 6.25 úr Klaksvík og úr Havn kl. 16.15.

Nýggja ferðaætlanin er góð fyri tey, ið búgva í Sundalagnum, og sum nærum mistu sambandið til Havnar, tá Eysturoyartunnilin varð tikin í nýtslu. Men hon man vera eitt afturstig fyri tey í norður- og eysturøkinum, ið hava brúk fyri bussi at koma til Havnar aðrar tíðir á degnum.

Nýggja farleiðin kann hava við sær, at fleiri velja bussin frá og brúka bil ístaðin. Tað elvir til meiri ferðslu á vegunum og størri útlát av vakstrarhúsgassum. Um fleiri túrar gjøgnum Eysturoyartunnilin verða settir á Leið 400, fáa nógv fleiri møguleika at nýta tryggastu og skjótastu farleiðina við almennu samferðsluni til og frá arbeiði. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

**Á Løgtingi 15. mars 2021**

Eyðgunn Samuelsen